Jónger› Poulsen, skúlaheilsusystir í Havn

Myndlist og angist

Herfyri var eg til frams‡ning hjá Ingálvi av Reyni. Málningarnir hjá honum nema meg á ein heilt serigan hátt. Teir vekja angist í mær.

Ein kvinna, sum eitur Marilyn Ferguson, sigur naka› solei›is: Ótti er ein spurningur. Hvørjum ert tú bangin fyri og hví? Ótti er eitt skattkamar til sjálvrannsakan.

Tí henda yrking:

Lørifti ›

fær skjálvtan
at krúpa
ni›ur eftir bakinum

sum ófrættabo›

hóttir múrin
la›a›ur
innanífrá

myndar svari›

krógva ›
á›renn spurningur var or›a›ur

sálin br‡tur út

av heimleysum ótta

*

eg varnist styrki
gró›ursetta í iva

eg varnist lív
kveikt av dey›a

lat fara

so fæst

Jónger› Poulsen

Sta›i›, sum ongin hevur sæ›

- eitt líti› ummæli av n‡ggju fløguni hjá Eivør Pálsdóttir

Petur Jensen ummælir:

Seinasta sunnukvøld var konsert vi› Eivør Pálsdóttir ni›ri í Meiarínum í Havn, í samband vi› at hon júst hevur givi› n‡ggja fløgu út. Konsertin var skipa› solei›is, at flestu ásko›ararnir vóru innbodnir, also fólk, i› hava stu›la› útgávuni, fjølmi›lar (i› annars als ikki møttu), vinir, familja og kenningar, umframt at konertin eisini var almenn. Eg má vi›ganga, at hóast eg havi hoyrt hetta orkestri› spælt einar 234 fer›ir eftirhondini, so var eg rættiliga spentur hetta kvøldi›, tí eg hev›i sum so slett ikki hoyrt naka› av fløguni, og tí var eg eitt sindur forvitin at finna út av, hvørja lei› fløgan fór at tra›ka. Og eg má siga, at eg var› ikki vónsvikin.

Konsertin, eins og fløgan, eigur teg longu frá byrjan. Ofta ver›ur tosa› um, at ein listarma›ur "letur seg úr" í síni list, men hetta kvøldi› kendi eg ta›, sum var ta› eg, ásko›arin, i› var› latin úr. Eivør byrja›i einsamøll vi› ófatiliga vakra lagnum "Um eg kundi kvø›i›", sum tíverri ikki er vi› á fløguni, men aftaná hetta komu Búi Dam, Brandur Jacobsen og Mikael Blak, i› eru tann serstakliga væl spælandi og kompetenta trio'in, i› spælir tónleikin á fløguni, inn á pallin, og fer›in inn í fløguna kundi byrja›. Á konsertini høvdu tey eisini fingi› avgjørt kompetenta hjálp á ljómbor›inum, vi› ta› at Magnus Johannessen spældi vi› í einum 3 løgum, sum hann kr‡ndi vi› eini vakrari og gó›ari solo. Á fløguni er ta› Tróndur Bogason, i› spælir hesi ljómbor›. Eitt anna›, sum eg haldi meg hava lagt merki til, tá eg eri á konsert vi› Eivør og teimum er, at ta› næstan altí› er pinnastilt inni ta› fyrstu longu løtuna. Næstan sum er man bangin fyri at bróta atmosferuna vi› onkrum óney›ugum ljó›i. Men hetta er eisini styrkin, bæ›i vi› fløguni og konsertini. Tónleikurin er tættur, nakin, samansettur og heilt ómetaliga intensur, og hetta ger, at tú ver›ur drigin innar vi› í tónleikin og kennir teg heima har eina løtu. Eitt av løgunum á fløgunum byrjar stuttligt nokk vi› or›unum "tú komst og bey› mær inn, til sta›i›, sum ongin hevur sæ›". Hetta er ein kensla, sum eg haldi sermerkir tónleikin og sangirnar hjá Eivør Pálsdóttir.

Eitt, sum altí› hevur undra› mong er, hví Eivør hevur valt at spæla hetta slag av tónleiki, i› mest kann kallast n‡mótans jazzur/vísufólkaligur tónleikur, tá hon hevur eina rødd, i› saktans kundi bori› hana langt inn í poppheimin. Til hetta svarar Eivør, at hon vi› síni fyrstu fløgu heldur vil sleppa inn til røturnar, til har, hon kemur frá. Og hetta hevur eisini eydnast henni til fulnar, má sigast. Úrvali› av sangum á fløguni er sera spennandi, og fevnir frá gla›um popputum vísusangi, gjøgnum sopransang og vøgguvísur yvir til Kingo sang. Hetta má sigast at vera ikki líti› av einum bragdi, tá ein 17 ára gomul kvinna fær vi› síni rødd spent seg so ví›a. At hon syngur sangir hjá Regini Dahl, Hanusi Johansen, Kingo og Búa Dam, so væl, sterkt og gjøgnumført, at tú ivast til tí›ir ikki í, at sálin í hesi kvinnu er elligomul. Tá hon syngur "Som den gyldne sol frembryder" hjá Kingo ljó›ar ta›, sum hevur hon siti› í Tjørnuvík í eini 74 ár og sungi› Kingo, ella tá hon syngur "Silvurkannan", vi› lagnum hjá Regini Dahl, ljó›ar ta›, sum hevur hon sungi› sopran á hægsta stø›i. Men tey allar sterkastu løgini, sum sita eftir, eru fyri mær vøgguvísurnar. Fyrst er ta› "Lítla barni›", i› er ein vøgguyrking, sum Sædis, mamma Eivør, hevur skriva› til síni børn, og er hetta eisini ein vøkur sta›festing av, at venda aftur til sínar røtur, at syngja eitt lag, sum mamman, har hon kemur frá, hevur skriva›. Sí›ani er ta› vísan "Jesuspápin", sum Búi Dam hevyr skriva› yvir eina vísu, hann lærdi sum smádrongur. Hetta er, eftir míni persónligu meting", kanska tann allarvakrasta vøgguvísan, sum nakrantí› er skriva›. Hvussu hon fangar andan í hesum lítla drongi, i› sendir eina bøn til ein Jesuspápa, á›renn hann fer at sova, men samstundis fangar hon eisini kenslur, sum øll vaksin kenna til. Men hetta er, sum á›ur sagt styrkin á fløguni.

Henda fløga hevur, meiri enn fleiri a›rar, megna› at fanga› ein anda, sum liggur í sangunum. Ein andi, i› er djúpt rótfestur í teirri føroysku sálini, og ein arvur, sum vit alt og ofta gloyma at vit hava fingi›. Tí er henda fløga eisini ney›ug. Tónleikurin er ikki til spillis. Ein kundi ofta havt hug at hildi›, at allir hasir jazzarnir hava alt ov gó›an hug at reypa og tvætla og improvisera í allar ævir, men solei›is er als ikki á fløguni. Tónleikurin er beinrakin, nakin, tættur, turrur og erligur. Her eru ongar óney›ugar finessur, sum ongum ø›rum siga, enn tónleikarum sjálvum. Men har er eisini ein broddur, ella eitt slag av dirvi. Serliga hugsi eg um sangin, sum Pól F. hevur skriva› "Føroyar, mín mó›ir", sum Eivør hevur gjørt eitt n‡tt lag til. Her flippar tónleikurin eitt sindur út í byrjanini, og eg ver›i ikki kløkkur, um onkrir av føroysku mentanaroddafiskunum allarhelst fer at krympa endatarmin tá hann hoyrir ta›. Men hetta prógvar eisini, at tey standa vi› sín tónleik, og framføra hann eins naki› og erligt og tey gera á konsertum.

Fløgan er upptikin so gott sum live (beinlei›is) øll sum hon er. Onkrar hissini røddir og okkurt anna› petti er tiki› upp aftan á. Men donsku teknikarnir hava vi› sera stórum hegni megna at sett eina fløgu saman, sum ljó›ar heilt ótrúliga væl. Hon ljó›ar so turr, at man næstan heldur Eivør standa inni í stovuni hjá tær og syngja. Tey vóru ni›ri í ein gó›an mána›a og tóku upp, mest orsaka› av at teir, sum eru so t‡dningarmiklir sum guitaristar og bassistar funnu út av, at ta› hev›i veri› eitt hugskot at skori› seg í hendurnar, og hetta seinka›i gongdina so miki›, at Hans Nielsen, i› átti studio, og stó› fyri tí mesta mátti leypa frá, og a›rir komu til, men hetta hevur ongan ska›a gjørt.

Kenslurnar, eg siti eftir vi›, bæ›i aftaná konsertina seinasta sunnukvøld, og her í kamari mínum, eftir at hava hoyrt fløguna nakrar fer›ir eru fleiri. Millum anna› kann eg vi› einum lítlum skálkasmíli sta›festa, at Eivør og tey prógva, at sorgblídni ikki er naka› neiligt og ni›urbrótandi hugtak, men naka›, sum kanska er ta› vakrasta, sum er til. Løg, sum "Ástarstund", "Randa›u rósur", "Jesuspápin" hava til dømis øll heilt jaligar tekstir, men ver›a í frambur›i, bæ›i í sangi og tónleiki, latnir í eitt sorgblídni, i› spøkir inni í tær, solei›is at tú hoyrir sangirnar fyri tær leingi aftaná at fløguspælarin er sløktur.

Tí vil eg rá›a fólki til at ogna sær hetta petti av føroyskari tónleikasøgu, og kanska enntá fara á konsert í Gøtu í anna›kvøld. Lat tíni egnu oyru og sinni ver›a førd inn í ein sta›, sum tú ikki hevur sæ›, men sum onnkursvegna altí› hevur vita›, var til.

LANDSVERKFRØÐINGURIN

Fíggjarlei›ari

Søkt ver›ur eftir fíggjarlei›ara til stovnin - til setan 1. mars 2001 ella eftir nærri avtalu.

Arbei›suppgávur
Fíggjarlei›arin skal saman vi› verandi roknskaparfólkum byggja upp eina sjálvstø›uga fíggjardeild og skal í hesum sambandi veita lei›sluni og deildunum á stovninum eina úrslitagó›a búskaparfyrisiting, herundir vi›líkahald og menning av fíggjarst‡ringini hjá stovninum.

Høvu›suppgávurnar annars hjá fíggjardeildini eru í høvu›sheitum: ger› av uppskoti til fíggjarætlan, játtanareftirlit, roknskaparlig skráseting, útgjaldingar og innkrevjingar av rokningum.

Førleikakrøv
Sóknast ver›ur eftir búskaparfrø›ingi vi› útbúgving frá hægri lærustovni.

Setanartreytir
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálast‡ri› og avvar›andi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsóknir vi› prógvum og møguligum ummælum ver›a at senda Landsverkfrø›inginum, Postboks 78, 110 Tórshavn og skulu ver›a skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 10. januar 2001. Merki› brævbjálvan »Fíggjarlei›ari«.

Nærri uppl‡singar um starvi› kunnu fáast frá Oyvindi Brimnes á tlf. 311333 (e-postur: Oyvindur@lv.fo).

Jólaaftan í KFUK

Vit eru nøkur, sum halda jólaaftan í KFUK. Eingin orsøk er til at sita einsamallur jólaaftan, so øll eru hjartaliga vælkomin at vera vi›, og hetta tiltak er ókeypis.

Jólahaldi› byrjar kl. 19.00.

Áhuga› tekna seg og fáa nærri at vita hjá Sonju Klein, presti, tlf. 310177, og Louisu í KFUK, tlf. 311928.

Tilmeldingarfreist á middegi 21. desember.

Brenderup

Vognar



Stødd: 205x130x40
Totalvekt: 500 kg
Hjól: 13"

TILBO‹ 7.995 kr.

Vit útvega sleipikrókar til øll bilmerki

Hansen · Tlf. 447142 ella 218540

Lei›ari til Brennistø›ina hjá IRF á Hagaleiti

IRF søkir vi› hesum eftir fólki til Brennistø›ina á Hagaleiti, at byrja 1. mars 2001, ella skjótast gjørligt. Tann, settur ver›ur í starv, skal ganga vakt og annars arbei›a saman vi› verandi lei›ara, á›renn hann tekur vi› sum lei›ari 1. november 2001.

Arbei›i› umfatar
at hava teknisku ábyrgdina av virkseminum hjá IRF á Hagaleiti:
- at vi›líkahalda allar tekniskar installatiónir
- at tryggja at umhvørviskrøvini ver›a hildin
- at halda bygningar og uttanumøki› í gó›um standi
- at fylgja vi› í menningini av vi›komandi teknikki og st‡ringum

At hava rakstrarligu ábyrgdina av Brennistø›ini:
- at tilrættaleggja móttøku av burturkasti til brenning
- at tryggja rætta handfaring av vandamiklum burturkasti
- at tryggja rætta skráseting av innkomnum tilfari
- at skipa starvsfólkavi›urskifti, herundir vaktarskipan
- at vera vi› til at menna vi›ger› av burturkasti hjá IRF

Krøv til umsøkjaran
Ney›ugt er at vi›komandi:
- hevur ví›ka›a maskinmeistaraútbúgving ella tilsvarandi útbúgving
- hevur hollan kunnleika til lei›slu og vi›líkahaldstilrættalegging
- hevur gó›an kunnleika til PLC-st‡ringar
- hevur gó›an teldukunnleika
- hevur gó› evni at arbei›a sjálvstø›ugt
- dugir væl at samstarva og veglei›a
- er fleksibul

Allar skrásetingar ver›a dagliga førdar á teldu, og er at ta› tí avgjørt ney›ugt, at umsøkjarin hevur gó›an praktiskan og teoretiskan kunnleika til skrivi-, rokni- og telduarbei›i.

Arbei›i› er sjálvstø›ugt og fjølbroytt, hevur nógvar persónligar menningarmøguleikar, eins og ta› setur krøv til gó› samstarvsevni, menniskjansligan og fakligan førleika. Alt hetta í einum gó›um arbei›sumhvørvi.

Lønin ver›ur sett eftir avtalu vi› avvar›andi fakfelag.

Nærri fæst at vita vi› at tosa vi› Ingvard Fjallstein ella Poul Andrias Joensen, tlf. 443343.

Skrivlig umsókn vi› avriti av prógvum, CV og møguligum ummælum ver›ur at senda til:

IRF
Att.: Poul Andrias Joensen
Postboks 39
FO-520 Leirvik
innan 5. januar 2001

IRF er eitt lutafelag, sum 42 kommunur eiga. Felagsskapurin bjó›ar sær at taka ímóti øllum burturkasti frá húsarhaldum, virkjum og stovnum í limakommununum. Arbei›i› fevnir um innsavning og vi›ger› av øllum burturkasti.

IRF byrja›i at brenna á brennistø›ini á Hagaleiti í Leirvík í 1989. Seinni er virkisøki› munandi ví›ka›. Umframt brennistø›ina rekur IRF í dag Spilloljuverki› á Kambsdali, seks tyrvingarpláss, umlastingarstø›, renovatiónsbilar, lastbila- og bingjuverksta›, slamsúgvarar og rottangatænastu.
Uml. 50 fólk eru í føstum starvi.

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

Sosialráðgevi

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir sosialráðgeva til sosialu deild.

Sosiala deild er partur av trivnaðarfyrisitingini og umsitur m.a. tey málsøkir, sum sambært galdandi almannalóggávu eru løgd til kommununa at umsita.

Nakrar av høvuðsuppgávunum
hjá sosialráðgevanum verða sambært barnaforsorgarlógini at ráðgeva børnum og familjum við trupulleikum og skipa fyri fyribyrgjandi tiltøkum sambært avgerð barnaverndarinnar. Deildin leggur stóran dent á tvørfakligt samstarv, og kemur sosialrágevin at hava tætt samstarv við aðrar fakbólkar.

Førleikakrøv
Grundleggjandi og avgerandi er, at umsøkjarin hevur góð samstarvsevnir og áhuga at arbeiða við børnum og familjum við trupulleikum.

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Kommunan bjóðar
eitt áhugavert starv við nógvum fjøllbroyttum og mennandi uppgávum við møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

Meira fæst at vita
um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen, deildarleiðara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 31 51 60.

Umsóknir
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 5. januar 2001. Viðmerk á umsóknina "Sosialráðgevi".

S N A R S K I V A N



Íbú› søkist

Fyri tvey av starvsfólkum okkara ver›ur hervi› søkt eftir íbú› beinanvegin.

Vinaliga seti› tykkum í samband vi› okkum skjótast gjørligt.

demich
Sti›jagøta 2 - Postboks 378
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 31 10 71
Telefax +298 31 04 60
e-mail: demich@demich.fo